# Miðlar

Maiken Skarðenni



## Agurkusalat

Agurkutíð eitur tann tíðin, tá bløðini ikki hava so nógv at skriva um. Og nýggjheitir, sum vanliga ikki høvdu sloppið fram at í meldrinum, fáa ein tjans. Tað er rættiliga ymiskt, hvat sleppur uppí part. Onkur søga um eina kvinnu, sum doyði av einum kitlitóli, stendur beint við síðunar av søgum um yvirskot hjá peningastovnum, og í donsku miðlunum fær ein søga um eina amerikanska sjónleikarakvinnu, sum ikki klárar at lata vera við at drekka seg skít og koyra bil, nógvar ferðir meira pláss, enn søgan um Fidel Castro, sum fyri fyrstu ferð í fýra ár hevur verið at sæð alment. Kanska er tað tí, at frøkun Lohan er behagiligari fyri eygað enn gamli skeggjuti Castro, sjálvt um tey bæði eftirhondini síggja rættiliga slitin út.

Agurkur ella ei, so er rættiliga ymiskt, hvussu netmiðlarnir verða røktir. Onkur netbløð verða javnan uppdaterað, og onnur liggja still upp í fleiri dagar, fyri so at bomba 10-12 greinar út eftir lítlari løtu. Hetta førir við sær, at onkrir av tíðindastubbunum rúka niður eftir síðuni beinanvegin og fáa ikki somu uppmerksomheit, sum teir ið sleppa at standa ovast í fleiri dagar.

Vit kundu lesa um Margretu Drotning ovast á breddanum á einari tíðindasíðu í fleiri dagar aftaná, at hon var farin aftur til flatlond. Í sjálvum sær kann tað vera bæði upplýsandi og undirhaldandi at lesa um Hennara Hátign, men bara fyrstu ferð. Ikki aðru, triðju og fjórðu ferð, ein sum lesari dag um dag fer inn á síðuna. Hví skula vit so koma aftur í morgin, vit vita longu, hvat stendur har.

Fyri nøkrum árum síðani hevði sonur mín, sum tá var hálvvaksin, beinkrím í nakrar dagar, og var tískil ikki í skúla. Fjórða dagin kemur ein vinmaður hansara til mín og spyr, um sonurin er heilt álvarsliga sjúkur. Mjúú, svaraði eg, hann hevur beinkrím og er nokkso illa fyri. Er tú bangin um hann? spyrji eg aftur. Ja, svaraði vinmaðurin, vit eru øll bangin um hann, hann hevur ikki verið online í fleiri dagar.

Er ein ikki online í fleiri dagar, so er okkurt alvorligt áfatt, viðkomandi er helst deyðakomin, tað er í øllum førum hugsanin hjá teimum ungu. Tað sær ikki út til, at allir teir føroysku netmiðlarnir hugsa soleiðis.

Onkuntíð royna netmiðlarnir at goyma "tær góðu søgurnar" til pappírsútgávuna. Um hetta førir við sær, at lesarin fer og keypir blaðið, so er tankagongdin skiljandi, men gad viti, um tað riggar. Man ikki lesarin klikkir yvir á ein annan netmiðil heldur?

Er trupulleikin kanska, at redaktørarnir slett ikki hava skilt teir nýggju miðarnir og ta nýggju tíðina og ikki virða tann digitala heimin líka høgt sum pappírsheimin?

Skal ein hava netmiðlar, skulu teir røkjast - at onki hendir, er tað sama, sum at blaðið er deytt.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*




*Vit klára at sannføra ein part av mótmælisfólkunum, men tað er ein langur vegur á mál. Og ímeðan skulu vit bara halda fast við traditiónirnar, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri*

# Halda fast um traditiónirnar

**GRINDADRÁP Jørgen Niclasen rystir ikki ó brókunum um greinina á heimasíðuni hjá Sea Shepherd. - Vit hava verið fyri media-hertzi síðani fyrst í 80-unum, uttan at tað hevur havt nakra ávirkan, sigur uttanríkisráðharrin**

Leo Poulsen

Á síðu 8 í dagsins blað verður greitt eitt sindur frá grein, ið Sea Shepherd hevur á heimasíðu síni um grindadrápið í Klaksvík mánadagin í vikuni.

Men ikki kann sigast, at hetta fær Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra, at liggja svøvnleysan um næturnar.

- Vit skulu bara halda fast við okkara traditiónir, tað vinna vit mest við, sigur Jørgen Niclasen.

Tað er einki nýtt, at slíkir djóraverndarfelagsskapir, sum Sea Shepherd, mest eru áhugaðir í at skriva søgurnar so tær selja, heldur enn sum sannleiksvitni.

- Teir royna at røra við kenslurnar hjá fólki, tí kenslur eru pengar. So tess meiri kensluborin fólk gerast, størri upphæddir donera tey til felagsskapirnar, sigur Jørgen Niclasen.

Uttanríkisráðharrin heldur ikki, at nýggjasta útspælið frá Sea Shepherd fær nakra ávirkan á Føroyar yvirhøvur.

- Vit hava verið úti fyri einari media-hertz síðani fyrst í 80-unum, men tað hevur hvørki gjørt til ella frá, og vit liva akkurát tað sama víðari, sum einki var hent, vísir Jørgen Niclasen á.

### Nógv mótmæli

Hann sigur, at uttanríkisráðið javnan fær mótmælisskriv frá fólki, sum so ells so heita á føroyingar um at gevast við at drepa grind.

- Tá tað er upp á tað ógvusligasta fáa vit útvið 600 mótmælisskriv um vikuna frá ónøgdum fólki. Okkara politikkur á økinum er, at vit svara øllum aftur og siðiliga greiða frá støðu okkara á grindaøkinum, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at mótmælisfólkini fáa at vita, at grindadráp er ein føroysk tradition, og grindastovnurin ikki er hóttur, og at grindin verður hildin til so humant, sum tilber.

- Av øllum svarunum, sum vit senda, venda tíggju prosent aftur til okkara, og av teimum hava helvtin skift meining um grindadráp. So tað hjálpir, men tað er kortini ein tungur burður at sannføra øll, sigur Jørgen Niclasen.

Hann sigur, at alt, sum verður nevnt um Føroyar, er reklama, sjálvt um slíkt sum hetta hjá Sea Shepherd ikki beinleiðis kemur undir góða reklamu.

- Tað týdningarmesta er kortini, at vit halda fast við okkara traditiónir og ikki lata okkum trýsta av fanatikarum, hvussu vælmeinandi teir annars kunna vera, sigur Jørgen Niclasen.

*leo@sosialurin.fo*